VIÐMERKINGAR

# Almennar snarskivur kring landið

Heidi Petersen
*Løgtingskvinna*
*Tjóðveldisflokkurin*



**Øvindsjúka og klandur til viks, fokus á hvat tænir landi og fólki best.**

Í kjalarvørrinum av orðaskiftinum um hættisligu vinnustøðuna í Suðuroy, har sjálvt lívsgrundarlagið undir samfelagnum rillar, er kanska eisini vert at hyggja kring alt landið og kanna, um møguleikar eru fyri at varðveita, flyta ella stovnseta nýggj almenn arbeiðapláss uttan fyri Havnina.

Vil hervið heita á allar politikkarar um at medvirka til at fyribyrgja, at støður sum í Suðuroy endurtaka seg aðrastaðni – leggja øvindsjúku og klandur til viks og hyggja eftir, hvat tænir landi og fólki best.

Her er ovmikið at tríva í. Vil her bert koma við einum boði uppá ein lítlan part av almennum tænastum, sum eiga at varðveitast úti um oyggjarnar og onkrar, sum eiga at flytast tættari borgaranum. Í sama viðfangi eigur kanska at vera umhugsað, um ikki eisini meira fekst burtur úr at samskipa fleiri almennar tænastur.

**Almennar snarskivur**

Áhugavert kundi verið at kannað, um tað ikki hevði loyst seg at skipað almennar snarskivur á øllum størri plássum kring landið.

Hugskotið frá Tórshavnar býráð, har borgarin hevur eitt stað at venda sær til við teimum viðurskiftum, hann skal hava avgreitt hjá kommununi, kann verða útbygt. Kring landið áttu almennar snarskivur at verið skipaðar, og kundu hesar veitt allar tær almennu tænastur, borgaranum tørvar.

Nøkur dømi um tænastur, ið kundu verið lagdar á eina slíka almenna snarskivu:

Bileftirlitið - koyrikort og nummarplátur
Heilsufrøðiliga Starvsstovan — heilsuváttanir
Toll- og Skattstovan - toll- og útflutningspappír
Almannastovan og ALS — borgarasamskifti við hesar stovnar.

Ivaleyst er listin av uppgávum langur, men eg steðgi her. Vil bert nevna eitt øki afturat, sum í løtuni sær út til at verða uppetið av umsitingini í høvuðsstaðnum: Tær tænastur til borgaran, sum í dag verða veittar av politistøðunum úti í økjunum.

Seinastu nógvu árini hevur miðvíst verið arbeitt við at niðursjóða virksemið hjá løgregluni kring landið og miðsavna hetta í Havnini. Hetta kann ivaleyst vera skilagott, um hugsað verður um reinar politiuppgávur, men hvat við øllum teimum tænastum, sum eru knýttar at politistøðunum? Trívi í nakrar tænastur, sum enn liggja kring landið, og sum borgarin ikki kann vera fyri uttan: Skráseting av skipum og bátum, mynstring av sjófólki, brúðarvígslur, treytir í sambandi við sundurlesing, adoptiónir, auktiónir, skiftirættarsakir og deyðsbúgv, fútasakir, útlegg og pant, grind og grindabýti, sjófrágreiðingar, náttúrufriðingar, grannastevnur fyri at nevna nakrar uppgávur, sum ikki hava so nógv við politiuppgávur at gera. Sjálvsagt skulu hesar varðveitast hjá brúkaranum, og ein almenn snarskiva hevði tá verið rætta staðið til slíkt virksemi.

**Fortreytin er politiskur vilji og samstarv**

Hvat krevst fyri at seta slíka skipan í verk? Jú, eg haldi hetta vera sera einfalt at fremja, og fortreytirnar eru tvinnar: politiskur vilji og samstarv.

Eftir útmeldingunum frá samgonguni skal ikki skorta uppá politiskan vilja at fremja menningartiltøk fyri økini uttan fyri miðstaðarøki. Tann fortreytin skuldi so verið í lagi. Tað krevur sjálvandi tíð at fáa alla tað politisku skipanina við, men er viljin til staðar, ber til í felag at røkka málinum.

Ein onnur fortreyt fyri at kunna fremja eina slíka ætlan er, at allir partar, sum verða umfataðir av eini umskipan, vilja samstarva. Almennir myndugleikar, stovnar og stovnsleiðarar, kommunur og kommunufelagsskapir, øll eiga at seta seg saman og í felag finna loysnir fyri, hvussu slíkar almennar snarskivur fáast at virka kring landið.

Vóni, at øll eru til dystin fús at samstarva yvir um politisk mørk fyri at finna skilagóðar loysnir landi og fólki at frama.

# Spekulatiónir og svans

Johan F Magnussen



Hetta, sum Ivan Johansen sigur, eru nøkur ting, sum rørast í Føroya fólki. Men fyri tað er hann ikki heilt uttan ábyrgd, tí hann hevur sitið sum landsstýrismaður við fiskivinnumálum undir sær.

Hann sigur, at tað var landsstýrið, sum kom eftir teir, sum hevur avskeplað skipanina. Hann sigur, at tað eru politikarar, sum hava ábyrd av tí, sum er farið fram.

Men tann maðurin, sum situr sum fiskivinnumálaráðharri, hevur ta ábyrgd, sum skal til fyri at steðga øllum hesum svansi, sum Heini í Kunoy kallar tað.

Ivan, hann sigur, at hvør gamal grønlandsbátur og aðrir bátar, sum hava staðið í neystum, komu aftur í drift ella hava fingið fiskiloyvi.

Hvussu er við rækjuloyvinum? Hvør eigur tey? Eru tað mans ogn ella er tað lands ogn? Spekulattónir út í odd og egg.

Fiskimálaráðharrin, hvar er hann? Hví tekur hann ikki veiðiloyvini inn? Tað er hansara ábyrgd. Vit hava havt fiskimálaráðharrar úr øllum flokkum. Tað er hvør verri enn annar.

Vit siggja nú, teir lata rækjuvinnuna bløða út og onki verður gørt. Tað haldi eg, at øll Føroya fólk kunna taka undir við at spekulatiónir hava vunnið á fornuftini.

Hvussu allir hesir hava fingið fiskiloyvir, vita trý í Fskimálaráðnum sum hava sitið har í nógv ár. Tað ørkymlar alt Føroya fólk, hvaðani øll hesi fiskiloyvini eru komin frá. Tað hoyrdist frá fiskimálaráðnum, at øll fiskiloyvir skuldu leggjast út á eina heimasíðu. Um tað vrð gjørt, so hevði man sæð, hvaðani tey eru komin frá, hvør ið hevur tey, og um nakar bátur ella skip er aftanfyri fiskiloyvið. Tað sær út, sum fiskimálaráðið ikki torir at koma fram við tí og leggja tað fyri Føroya fólk. Livst so spyrst.

Vit eiga ein bát, sum fekk veiðiloyvi fyrst í 1986, sum seinni bleiv umlagt til fiskiloyvi. Vit havi onki goldið fyri hetta loyvi, og hava heldur ikki selt tað til nakran. Men eg havi haft góð tilboð upp á tað loyvið.

Nú um dagar fór línubáturin Mars av Míðvági. Seldur til Hósvíkar, har hann skal brúkast sum reservadeilir, stendur at lesa. Men mín sann skal hann eisini brúkast til at goyma fiskiloyvið hjá einum báti, sum er í frálandavinu.

So tað er ikki bara Janus - Havbúgvin-Popy-Drengur-Jógvan S og nógvir aðrir, sum eru blandaðir í hetta svansið. Tað er skylda hjá landsstýrismanninum - bara honum og ongum øðrum - at fáa loyst hesa fløkju.

At vit eru ein fiskivinnutjóð og skula liva av tí, sum havið gevur, so má tað fáast skil á nú, um tað ikki longu er ov seint.

# Uttanumtos og ræðumyndir – ein oddagrein í Dimmlætting

Áki Andreasen



Oddagrein í Dimmalætting 21. februar staðfestir, at ræðumyndirnar eru fremsta amboð hjá afturhaldinum, og Dimmalætting helst ikki er so óheft sum blaði vil verða við.

Lat meg gera greitt beinanvegin at mær dámar væl at vit í Føroyum hava møguleikan at kjakast og hava ymiska meiningar um ymiskt mál. Eins væl dámar mær tá vit hava møguleikan at vera ósamd.

Men tá Dimmalætting vil vera við at undirritaði ikki vil, at onnur úttala seg um samfelagsviðurskifti, so er tað at tilluta mær nakað sum eg takið frástøðu frá og als ikki takið undir við, so fingu vit tað spøkilsi av vegnum.

**Tey náddu politisku málini!**

Oddagreinskrivarin metir tað vera burtur við, at vísa á nádd politisk mál, at tað er galið at vísa á, at nádd úrslit er partur av ávísum politikki, í oddagreinini stendur: *"Men undarligt er tað at hoyra, tá politisk tilvitað fólk soleiðis taka sær rættin til ávís úrslit, sum eru nádd í politiskum høpi gjøgnum tíðina"*.

Álvaratos - er oddagreinskrivarin ein ársungi á politiska vøllinum og í samfelagskjaki annars?

Eru júst úrslit ikki ein partur av førda politikki?? - tað vil eg vóna, tí tann dag politikkur ikki hevur til endamáls at náa úrslitum, tá kann alt vera líkamikið.

Hinvegin so skilji eg á ein hátt greinskrivaran, tí hvat er politiska málið hjá Sambandsflokkinum?? At varðveita og helst økja sambandi við Danmark?? - at økja blokkin - kundi ljóða sum góður sambandspolitikkur - men er tað endamálið?? Nei, sambandspolitikkur er ikki lættur at lýsa í dag, tí veruleikin er tann, at kjarnan í politikki sambandsfloksins, er at avmarka føroyskt vald í egnum landi.

**Uttanumtos og ræðumyndir**

Tað er bæði veruleikafjart og fjákut, tá oddagreinin leggur upp til at tey sum ikki taka undir við einum frælsum Føroyum fáa munnkurv tá fullveldi gerst veruleiki, í oddagreinini stendur: *"Hvat sleppa tey at gera í fullveldinum Føroyum? Hvat sleppa tey at útala seg um?"*

Tað er eitt sindur undrunarvert at slíkt skal vera partur av einari oddagrein - er kanska ikki vert at viðmerkja, men hatta er so langt frá veruleikanum at ilt er at taka greinskrivaran fyri fult. Mjørkaskrivingin um flóttafólk er ein sjúklig samanbering og undir alt lágmark.

Hatta er einki annað enn uttanumtos og ein reindyrkaðar ræðumyndir.

Royndin at spjaða fullveldisfólk liggur heldur ikki eftir, í oddagreinini stendur: *"Vónandi umboðar skrivarin ikki muruna í øllum fullveldissinnaðum føroyingum"*. Mín meining er mín egna - so einfalt er tað; men hetta er so eyðkent - royndin at spjaða ella seta spurningin um "muran" er góð ella ring, og at bólka summi í bólkar ella "veingir".

Eitt ráð kundi verið at fingið meira tyngd í oddagreinirnar - tí støði er ivasamt í Dimmalætting 21. februar 2005.

**Og so tað persónliga....**

Oddagreinskrivarin hevur eisini ilt við ikki at koma inn á tað persónliga, í oddagreinini stendur: *"..annað enn at hann er løntur skrivari hjá floksskrivstovuni"*.

Eg skrivaði eina grein, sum var ein viðmerking til eina grein hjá tinglimi Sambandsfloksins. Eg setti mítt kristna navn undir - greinin var mín persónliga meining, og einki við mítt skrivarastarv at gera. Hví nýtir oddagreinskrivarin ikki mítt navn? - tá viðkomandi kortini dregur mítt starv inn í greinina....

Tá grundgevingarnar eru burtur í vón og viti - so skal tað onkursvegna dragast ein flokspolitiskur tráður ígjøgnum alla greinina - tí tá er málið helst nátt.

Vóni at Sambandsflokkurin og Dimmalætting í framtíðini gera sær størri ómak at grundgeva fyri sínum politikki, og ikki framhaldandi nýta ræðumyndir og pástandir um munnkurv og persónligar avmarkingar, við rasistiskum undirtónum og skammiligum samanberingum við flóttafólk; við eittans endamálið at ræða føroyingar at stýra í egnum landi.